www.oljan.fo

**Jan Müller** 22 - 07 - 2013

# Íslendingar vilja leita eftir olju í Norra

Íslendingar ætla sær ikki at standa aftanfyri føroysku grannarnar fyri sunnan, tá tað snýr seg um oljuleiting. Teir vilja nevniliga vera við til at leita eftir olju og gassi á norska landgrunninum. Í dag eru bæði tey føroysku oljufeløgini, Faroe Petroleum og Atlantic Petroleum við í oljuleitingini í Norra. Talan er um íslendska oljufelagið Eykon Energy, sum hevur sett sær fyri at vera við í norsku oljuleitingini. Fyri at kunna tað má felagið fáa neyðugu loyvini til eitt nú prekvalifisering, og tað er hetta felagið nú hevur søkt norskar oljumyndugleikar um. Og við sær at røkka hesum máli hevur felagið fingið ein gamlan kenning frá føroysku oljuleitingini, Terje Hagevang, leiðandi jarðfrøðing. Hann er í dag jarðfrøðiligur ráðgevi hjá felagnum og partur av nevndini í Eykon, sum hevur fingið tillutað loyvi á Dreka leiðini við Jan Mayen saman við tí kinverska oljufelagnum CNOOC. Eykon roynir nú at vera við í næstu TFO útbjóðingini á norska landgrunninum. Felagið er longu í ferð við at lata upp sína egnu skrivstovu í Oslo. "Fleiri lyklapersónar, sum skulu arbeiða fyri felagið í Norra, eru longu komin uppá pláss. Eisini er ein samstarvsavtala við at fara av bakkastokki við ráðgevarafyritøkuna Inoil, skrivar felagið í síni umsókn. Tað eru stóru fundini, sum eru gjørd á norska landgrunninum og í Barentshavinum, sum hava fingið nógv nýggj oljufeløg at søkja um prekvalifisering. M.a. hava altjóða oljurisar so sum Lukoil, Tullow og Rosneft sagt seg vilja gerast partur av norsku leitingini umframt nógv minni feløg. Tað er ikki minst leitifrádrátturin, sum kom í gildi í 2005 og sum endurrindar allar leitiútreiðslur hjá oljufeløgum, sum bora í Norra, sum dregur nýggj oljufeløg til norska landgrunninum. Hetta hava bæði tey føroysku oljufeløgini sannað. Norska oljudirektoratið hevur so eisini sína meining um, hvør skal sleppa inn á landgrunnin. Kravið er, at feløgini skulu geva sítt íkast til virðisøkingina. OD ynskir ikki fíggjarílegjarar burturav sum nýggjar spælarar á norska

landgrunninum. Tey mugu hava vitan og royndir og eisini orku, serstakliga innan undirgrund. Samtíðis hevur Petroleumseftirlitið síni minimumskrøv til HMS, sum skulu haldast. Kelda: Offshore.no